Oyggjaleikir 2005
SHETLAND



**Sosialurin í Hetlandi**

Jens Kristian Vang,
myndamaður
jensk@sosialurin.fo

Eyðun Klakstein,
blaðmaður
eydun@sosialurin.fo

Jákup Mørk,
blaðmaður
jakup@sosialurin.fo

# Heiðursmerkini eru kolldømd

**Graveringarnar á gull- og bronsu-medaljunum er ikki nóg góðar, og tí fáa allir gull- og bronsu-vinnarar á Oyggja-leikunum í Hetlandi nýggj heiðursmerki sendandi eftir leikirnar**

HEIÐURSMERKI
*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Lagið var einki serligt á fyrireikarunum av Oyggjaleikunum á Hetlandi, tá ið teir kundu staðfesta, at heiðursmerkini eru ikki nóg virðilig at lata teimum vinnandi ítróttarfólkunum.

Tað eru gull- og bronsuheiðursmerkini, sum ikki eru í lagi. Graveringarnar eru ikki nóg góðar, og tær skulu tí gerast umaftur.

Tað er tó vónleyst at gera øll heiðursmerkini av nýggjum hesa vikuna, tí heiðursmerkini eru serliga framleidd til leikirnar, og tað verður gjørt í Skotlandi.

– Vit hava fingið at vita, at tey, sum vinna gull og bronsu, fáa heiðursmerkini um hálsin eftir kappingarnar, og tey kunnu eisini taka tey heim við, men seinni fáa tey nýggj heiðursmerki sendandi, sigur Sølvi Reinert Hansen, formaður í føroysku Oyggjaleikanevndini.

### Fáa tvær medaljur

Tey, sum vinna silvurmerki, hava onga orsøk til at stúra, tí teirra heiðursmerki er í lagi, og tey verða ikki gjørd av nýggjum.

– Tað er eitt sindur óheppið, at hetta skuldi henda , men tað er einki at gera við tað nú. Fyrireikararnir siga, at teirra veitari í Skotlandi hevur gjørt mistakið, men kanska kundu fyrireikararnir verið í eitt sindur betri tíð við heiðursmerkjunum, so tað hevði veri gjørligt at rætta mistakið áðrenn sjálvar leikirnar, sigur Sølvi Reinert Hansen.

Hann hevur einki frætt um, at luttakararnir, sum vinna gull og bronsu, skulu lata hesi aftur, áðrenn tey fáa tey nýggju heiðursmerkini.

– So tey, sum vilja hava eina originala medalju beinanvegin, skulu vinna silvur, meðan tey, sum vilja eiga tvey sett heima, skulu vinna gull ella bronsu, sigur Sølvi Reinert Hansen skemtandi.

Eitt er so púra vist, graverandi mistakið við heiðursmerkjunum fær so onga ávirkan á hugin hjá ítróttarfólkinum at vinna kappingarnar…



*Heiðursmerkini sum Halltóra Joensen og øll hini ítróttarfólkini á Oyggjaleikunum stríðast um, er kolldømd av fyrireikarunum. Nýggj heiðursmerki skulu gerast, og tí fáa øll tey, sum vinna gull ella bronsu, endaligu heiðursmerkini sendandi eftir kappingina*

## Live-úrslitatænasta

Meðan kappast verður á oyggjaleikunum, verða úrslitini frá einstøku kappingunum lagdar á alnetið, so hvørt sum hesi verða staðfest.

Almenna heimasíðan hjá leikunum eitur www.shetlandresults2005.com, og á hesari kann so fylgjast við í einstøku kappingargreinunum.

**-jm**

## Útvarpsmet

BBC Radio Shetland fer at seta sendimet í vikuni, sum oyggjaleikirnir eru. Hvønn dag verður sent beinleiðis frá kl.14 til kl. 19, og tað er ongantíð áður roynt her á oyggjunum, verður sagt.

**-jm**

## Skjót journalistin!

Sonevnda pressusentrið á oyggjaleikunum liggur væl fyri sum partur av stóra Clickamin ítróttardeplinum, sum er sjálvt hjartað á oyggjaleikunum. Heldur forkunnugt, so er sjálvur fjølmiðladeplin innrættaður í hølum, sum vanliga verða nýtt sum skjótibreyt, so skelti um nýtsul av oyraverndum og um at taka fyrilit fyri skjótinginI eru partur av veggjaprýðinum í hølunum.

**-jm**

## Áland ella Ynos Mon

Týsdagin verður tað gjørt av, hvar Oyggjaleikirnir í 2009 verða hildnir.

Áland og Ynes Mon hava bjóðað seg fram, og á aðalfundinum hjá IGA skal atkvøðast um, hvør skal hava leikirnar. Fyri fyrstu ferð nakrantíð verður aðalfundurin hjá IGA opin fyri fjølmiðlunum.

**ek**